

Hevur tú hug at arbeiða á einum almennum stovni, har arbeiðsdagurin ikki stendur stillur og uppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar – ja so hava vit júst brúk fyri tær!

# Ergoterapeutur / Fysioterapeutur til Hjálpartólamiðstøðina

Á HTM er eitt fyribilsstarv, fyri eitt av starvsfólkum okkara, sum hevur hug at royna aðrar leiðir í eina tíð, leyst at seta frá 1. mai 2007 til 31. des 2007. Talan er um fulltíðarstarv á 40 tímar um vikuna sum ráðgevandi/máls-viðgerandi Ergoterapeutur/ Fysioterapeutur.

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur**

- útbúgving sum ergoterapeutur/ fysioterapeutur.

**Ynskiligt er at umsøkjari hevur**

- royndir frá líknandi arbeiði
- kunnleika til at arbeiða við fólki við niðursettum førleika
- kunnleika til almannalóggávuna
- evnir at seta í verk fyriskipanir
- góð samstarvsevnir
- góð evnir at orða seg bæði munnliga og skriftliga
- telduførleika á brúkarastøði

**Vit kunnu bjóða**

- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- tætt samstarv við starvsfelagar
- tvørfakligt samarbeiði
- fakligt mennandi umhvørvi

**Løn og setanartreytir**

sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

**Nærri upplýsingar**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM, telefon 358300.

**Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til**

Hjálpartólamiðstøðina,
Postboks 1049,
110 Tórshavn.

ella við telduposti til htm@almannastovan.fo.

**Umsóknarfreist**

Fríggjadagin 17. apríl 2007.

htm@almannastovan.fo · www.almannastovan.fo

HTM

HTM er stovnur undir Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 12 fólk á HTM. Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.: 1) upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar. 2) útlán og endurnýtslu av hjálpartólum. 3) viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar. 4) tvørfakligt samstarv – innan- og uttanhýsis.

KREA.FO · TEL 47 80 80

HAVNAR ARBEIÐSMANNAFELAG

www.haf.fo

## FRÁ HAVNAR ARBEIÐSMANNAFELAG

### TIL LIMIRNAR

Viðvíkjandi aðalfundinum hjá Felagnum og Eftirlønargrunninum 2007.

Sum kunnugt hevur verið arbeitt við at umskipa eftirlønargrunnin hjá Havnar Arbeiðsmannafelag.

Hetta arbeiði tekur longri tíð enn roknað hevur verið við og er tíanverri ikki komið á mál enn.

Nevndin hevur tí avgjørt at útseta aðalfundin hjá felagnum og eftirlønargrunninum, sum ætlandi skuldi vera hildnir tann 31.mars 2007.

Nærri verður lýst um fundirnar seinni.

***Nevndin***

TINGHÚSVEGUR 7 · BOKS 305 · TLF. 312106 · FAKS. 319857 · E-POST: HAF@HAF.FO





Vit sóknast eftir arkitekti, byggifrøðingi ella teknikara við aðrari viðkomandi útbúgving.

# ARKITEKTUR / BYGGIFRØÐINGUR

Ert tú áhugaða/ur í avbjóðingum á einari teknistovu, har tú fært møguleika sjálv/ur, saman við øðrum, at menna títt arbeiðspláss, og har arbeiðsumstøður og arbeiðsumhvørvi verða sett í hásæti?

**Arbeiðsuppgávur**

Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna millum annað um:

- um- og nýprojektering av bygningum
- vega- og anleggsprojektering
- projektgransking
- útbjóðingar
- fakeftirlit og byggileiðslu
- uppmátingar og avsetingar av verkætlanum við GPS- útgerð.

**Førleikakrøv**

Vit rokna við, at tú ert opin og fyrikomandi, at tú hevur góð samstarvsevni og ert hugaðu/ur at arbeiða sjálvstøðugt við áðurnevndu arbeiðsuppgávum. Best er, um umsøkjarin hevur royndir frá teknistovuarbeiði, men er hetta als ikki nøkur treyt. Hevur tú nýliga fingið tína útbúgving og brennur fyri teknikarayrkinum, ert tú vælkomin at søkja.

**Setanarviðurskifti**

Løn og setanartreytir annars verða eftir nærri avtalu.

**Umsókn og freist**

Umsókn við avriti av prógvi, lívsgongdarlýsing (CV) og møguligum viðmælum, skal sendast til niðanfyristandandi adressu og vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. apríl 2007.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

EM Ráðgeving Sp/F · Heiðavegur 15 A · FO- 600 Saltangará
Tel 47 77 00 · Faks 47 77 01 · emr@emr.fo

EM RÁÐGEVING

KREA.FO · TEL 47 80 80